# Norðoya Sparikassi áhugaður í Vágum

**Leiðslan i Norðoya Sparikassa hevur verið í Sandavági og kannað møguleikarnir fyri at lata deild upp í bygdini**

TÆNASTA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*




*Deildin hjá Føroya Sparikassa í Sandavági letur aftur í morgin, og so er eingin peningastovnur í bygdini. Norðoya Sparikassi arbeiðir, eftir áheitanum úr Sandavági, seriøst við møguleikanum at lata deild upp í bygdini*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Norðoya Sparikassi er áhugaður í at lata deild upp i Sandavági, nú Føroya Banki hevur latið aftur, og Føroya Spariakssi steingir í morgin. Leiðslan í Norðoya Sparikassa hevur verið í Sandavági og kunnað seg um støðuna.

– Tað er eingin endalig støða tikin til málið enn, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, men áhugin frá okkara síðu er reellur. Og vit hava fingið fleiri beinleiðis áheitanir úr Sandavági um at lata deild upp, so vit arbeiða í álvara við málinum.

Tað verða sjálvandi fleiri spurningar at taka støðu til, áðrenn gjørt veðru av at taka so stórt stig, sum lata upp deild í Vágum, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa. Men í hansara hugaheimi er tað als ikki ómøguligt, at ein slík deild gerst veruleiki.

Norðoya Sparikassi hevur deildir ymsastaðni í Norðoyggjum og í Leirvík, og tað ber væl til, sigur hann. Vágar og Norðoyggjar líkjast eftir hansara meting nakað væl, so tað skuldi ikki verið ókent land hjá sparikassanum at komið vestur í Vágar við eini deild.

Sjálvandi kostar tað at hava eina deild í Vágum, og tí má roknast væl eftir, hvørjir fyrimunirnir og vansarnir eru, áðrenn endalig avgerð verður tikin um at lata upp, sigur hann. Tað arbeiðið er í gongd. Málið hevur verið viðgjørt á nevndarfundi í Norðoya Sparikassa, og stjórin arbeiðir nú víðari við tí.

Eyðfinn Reyðberg sigur, at tá tað var veruleiki, at báðir teir stóru peningastovnarnir stongdu sínar deildir í Sandavági, fekk Norðoya Sparikassi beinleiðis áheitanir úr Sandavági um at lata deild upp í bygdini.

Hann metir eina bygd við oman fyri 700 fólkum, sum ein rímiligan marknað, og tí verður arbeitt seriøst við hesum málinum, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa.

# Áhugi fyri krígsminnum

**Fólk frá Føroya Fornminnissavni vóru í seinastu viku vesturi í Vágum og hugdu at leivdum av bygningum, sum støðu uppi undir krígnum**

KRÍGSMINNI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:**
Hósdagin í seinastu viku vóru fólk frá Føroya Fornminnissavni í Vágum og hugdu at gamla torninum við flogvøllin og skortsteininum, sum stendur í Vatnsoyrum, har bretar hildu til undir krígnum.

Ongar avgerðir eru tiknar um, hvat gerast skal við tað, ið eftir er av bygningunum, bretar bygdu í Vágum undir krígnum, sigur Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum. Fólk frá Fornminnissavninum hava verið og hugt, og tosað hevur verið um ymiskt, sum møguliga kann gerast við hesar leivdirnar.

Tað, sum mestur áhugi er fyri í løtuni, eru gamla flogvallartornið og bygningurin við síðuna av tí, sum standa beint oman fyri vegin norðanvert flogvøllin.

Eisini er skortsteinurin, har bretar høvdu offisersmessu í Vatnsoyrum rímiliga væl varðveittur og tí av áhuga hjá teimum, sum tosa um krígssavn.

Tí talan verður helst ikki um fornminni sum so, men heldur um krígsminni, sigur Terji Nielsen.

Hann sigur, at Føroya Fornminnissavn hevur samband við ymisk krígssøvn uttanlands, og at toað verður við hesi um vitan og royndir, ið tey hava, og sum so kunnu brúkast í einum møguligum krígssavni í Vágum.



*Gamla eftirlitstornið, sum bretar bygdu við flogvøllin í Vágum undir krígnum, er í ringum standi, og skal tað varðveitast, er tíð at gera nakað nú*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Skortsteinurin í offisersmessuni í Vatnsoyrum er rímiliga heilur enn og hevur áhuga hjá teimum, sum tosa um krígssavn*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Jógvan á Lakjuni ongin vandi fyri fólkakirkjuna

**– Jógvani á Lakjuni er ein hampamaður og hann fer heilt avgjørt ikki at leggja fólkakirkjuni eitt holmstrá í vegin, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

FÓLKAKIRKJAN OG LANDSSTÝRISMAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Fólkakirkjan er í góðum hondum, hóast landsstýrismaðurin er limur í brøðrasamkomuni og í løtuni er ongin orsøk til at gera broytingar, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

– Hjá Jógvani á Lakjuni er fólkakirkjan í góðum hondum.

Tað er Jóannes Eidesgaard, løgmaður, púra sannførdur um.

Hann sigur, at hann als ongan ampa av at seta Jógvan á Lakjuni at umsita fólkakirkjuna í Landsstýrinum, hóast hann er limur í brøðrasamkomuni.

Hann ivast heldur ikki í, at fólkaflokkurin innanfloks hevur umhugsað hesa serligu støðuna, men er komin eftir, at hann hevur fult álit á, at Jógvan á Lakjuni fer at umsita kirkjumál á fullgóðan hátt.

– Jógvan á Lakjuni er ein hampamaður í allar mátar og hann fer heilt avgjørt ikki at leggja føroysku fólkakirkjuni so mikið sum eitt holmstrá í vegin, sigur Løgmaður.

– Mentamál er eitt stórt málsøki og fólkakirkjan er ein partur av tí og eg ivist onga løtu í, at nýggi landsstýrismaðurin fer at umsita fólkakirkjuna eftir løgtingsins vilja, leggur hann afturat.

Hann heldur sostatt ikki, at tað í hesum føri er nakar vandi at seta ein lim í brøðrasamkomuni at umsita kirkjumál.

– Hinvegin er Jógvan á Lakjuni lærari og skúlamaður burturav og júst skúli og útbúgving eru nógv tey størstu málsøkini í mentamálaráðnum.

– Harafturat kemur tað, at Fólkakirkjan er eitt sera eymt mál fyri føroyingar og tey eru mong, sum fylgja væl við tí, sum hendir innan kirkjugátt. Somuleiðis eru tað nógv í løgtinginum, sum fylgja gjølliga við gongdini í fólkakirkjuni, so eftirlitið við landsstýrismannin er stórt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir annars á, at landsstýrismaðurin umsitur bara politisku ábyrgdina av kirkjuni og kann ikki á nakran hátt leggja seg út í gudgfrøðiliga innihaldið í kirkjuni.

– Eg haldi ikki at tað er komið fyri, at ein landsstýrismaður hevur lagt seg út í gudfrøðilig innanhýsis viðurskifti í fólkakirkjuni og tað fer Jógvan á Lakjuni heldur ikki at gera.

Í løtuni er tað drotningin, sum t.d. setir ritual í gildi í kirkjuni. Tann dagin, kirkjan verður yvirtikin, eru sannlíkindi fyrk, at tað verður landsstýrismaðurin, sum fær hesa ábyrgdina. Hvussu fer tað at rigga, um landsstýrismaðurin tá er limur í brøðrasamkomuni, sum er grundleggjandi ósamd við kirkjuna um nógv viðurskifti?

– Kirkjan verður hvørki yvirtikin í dag ella í morgin. Yvirtøkan er ein hóvlig og væl gjøgnumhugsað tilgond, sum fer fram í samstarvi við allir partar í skipanini, so at øll føla seg trygg við gongdina. Og kemur tað so langt, verður hetta uttan iva eisini ein spurningur, sum vit finna eina loysn á.

### Ikki leypa framav

Løgmaður heldur sostatt ikki, at tað er nøkur orsøk til at leypa framav í hesum máli.

Men hann sigur, at er ovasta leiðslan í Fólkakirkjuni ótrygg við støðuna, er tað avgjørt eitt mál, sum verður tikið upp.

– Tað gera vit á tann hátt, at vit fara at kalla leiðsluna í fólkakirkjuni til fundar at tosa um viðurskiftini.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann hevur avtalað við Jógvan á Lakjuni, at landsstýrismaðurin skal kalla Bisp og løgmann og kanska eisini onnur í leiðsluni í fólkakirkjuni, saman til fundar at tosa um tey viðurskifti, sum gera kirkjufólk ótrygg.

– Eg vil fegin hoyra frá teimum sjálvum, hvat tað er, tey eru ótrygg við, leggur hann afturat.

Hvat sigur tú til uppskotið frá bispi um at lata onkran annan landsstýrismann, ella løgmann sjálvan, sum er limur í fólkakirkjuna, yvirtaka umsitingina av fólkakirkjuni?

– Tað er ein politiskur spurningur. Flokkarnir í samgonguni hava býtt tey ymsu málsøkini ímillum sín. Og skal nøkur broyting vera, má tað viðgerast í samgonguni. Men í løtuni haldi eg ikki, at tað er nøkur ørsøk til at gera broytingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Meiningar frá lesarum

**Vit hava fingið fleiri teldubrøv frá lesarum um støðuna hjá fólkakirkjuni, nú ein limur í brøðrasamkomuni hevur fingið ovastu ábyrgdina fyri kirkjuni.**

**Her eru tríggjar meiningar**

**Løgmaður óheppin**
Her tykist Jóannes Eidesgaard at hava verið heldur óheppin. Flokksfelagarnir hjá honum í Noregi hava verið í sama trupulleika – hetta hendi seinast ið Jens Stoltenberg varð forsætismálaráðharri.

Trupulleikin var tann sami. Ráðharrin sum var ætlaður at umsita kirkjumál, var ikki limur í Fólkakirkjuni. Men trupulleikin varð loystur aðrenn stjórnin fór til verka við at flyta kirkjumál yvir til ein annan ráðharra, sum var limur í Fólkakirkjuni.

Annars er at siga, at í Noregi er óhugsandi at onnur enn kirkjufólk umsita Fólkakirkjuna í stjórnini. Hugsanin er, at so leingi vit hava eina statskirkju, eru tað limir í statskirkjuni sum umsita hana á politiskum stigi.

*Lesari í Noregi*

**Bara hann er frelstur**
Eg haldi at tað ger tað sama um tað er ein limur í brøðrasamkomuni, sum umsitur kirkjumál. Bara maðurin er frelstur, so er tað gott. Tað er tað einasta, bispur eigur at hugsa um

*Lesari í Føroyum*

**Hvat er trúarfrælsi**
Hvat skilir bispur við hugtakið »trúðarfrælsi«. Er trúarfrælsi at tú sleppur undan »happing« fyri tína trúgv, men so heldur ikki meira. Ella er trúarfrælsið, at øll eru javntsett í føroyska samfelagnum, eisini at kunna gerast Løgmaður.

*Lesari í Føroyum*

# Kundi hugsað sær at sloppið at tosa við bisp

**Jógvan á Lakjuni heldur ikki, at tað er ein trupulleiki at hann umsitur kirkjumál í landsstýrinum, hóast hann er baptistur, tí hann hevur eitt samgonguskjal at halda seg til og er settur at umboða alt Føroya Fólk**

LANDSSTÝRISMAÐUR OG FÓLKAKIRKJAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Teir landsstýrismenn, sum hava verið undan mær og sum hava verið limir í fólkakirkjuni, hava eisini umsitið baptistarnar. Eg dugi ikki at síggja mun á tí og at tað nú er ein baptistur sum umsitur fólkakirkjuna, sigur Jógvan á Lakjuni*

– Eg eri settur at umsita samgonguskjalið og tað ætli eg mær at gera.

Jógvan á Lakjuni, nýggjur landsstýrismaður í Kirkjumálum er ikki samdur við Hans Jacob Joensen, bisp um, at tað er burturvið, at ein limur í brøðrasamkomuni er settur at umsita kirkjumál í nývalda landsstýrinum.

Í blaðnum í gjár, fanst okkara ovasti kirkjuligi leiðari at avgerðini at seta ein landsstýrismann, sum ikki var limur í fólkakirkjuni at umsita kirkjumál.

Hann helt, at hetta var tekin um manglandi virðing fyri Fólkakirkjuni og hann helt eisini, at nýggi landsstýrismaðurin kundi koma í tvístøðu ímillum kirkjuna og sín natúrliga loyalitet ímóti teirri samkomu sum hann er limur í og sum er grundleggjandi ósamd við kirkjuna um nógv viðurskifti, eitt nú barnadóp og konfirmatión.

### Kundi hugsa sær fund

Jógvan á Lakjuni vil ikki gera viðmerkingar til einstakar lutir í atfinningunum frá bispinum.

Men hann sigur, at hann kundi væl hugsað sær at sloppið á fund við Bisp, kanska saman við løgmanni og onkrum leiðarum fyri kirkjuna, dómpróstin, til dømis.

À hesum fundinum kundi ymisk viðurskifti viðvíkjandi atfinngingunum hjá Bispi verðið útgreinað.

Hann vísir kortini á, at hann hevur eitt samgonguskjal at halda seg til.

Í samgonguskjalinum stendur orðarætt, at fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í sambandi við yvirtøku verða goldnar av landskassanum.

– Hetta er tann politiski málsetningurin hjá hesi samgonguni og hann ætli eg mær at halda meg til.

– Tað er samgongan, sum hevur sett meg at umboða alt Løgtingið og alt Føroya Fólk. Og eg ætli mær at gjøgnumføra løgtingsins vilja og ikki mín egna vilja. Og har havi eg eina púra greiða orðing í samgonguskjalinum at halda meg til, sigur landsstýrismaðurin.

Jógvan á Lakjuni leggur afturat, at hann ætlar sær at hava gott samstarv við nevndina, sum arbeiðir við yvirtøkuni av fólkakirkjuni. Hevði tú góðtikið, at ein prestur varð ovasti leiðari fyri brøðrasamkomuna?

– Hasin spurningurin er so ómetaliga einfaldur. Sum Landsstýrismaður umsiti eg eisini allar fríkirkjurnar. Og teir landsstýrismenn undan mær, sum hava verið limir í fólkakirkjuni, hava sostatt eisini umsitið baptistarnar. Eg dugi ikki at síggja mun á tí, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann leggur afturat, at hann ætlar sær ikki at mótarbeiða nøkrum trúarsamfelagi og hóast at hann er limur í brøðrasamkomuni, ætlar hann at hevja seg upp um tað einstøku samkomuna og at umsita alt økið við tí politiska endamáli, sum samgongan hevur sett sær fyri.

Hvat sigur tú til uppskotið frá bispi um at lata onkran annan landsstýrismann, sum er limur í fólkakirkjuni, umsita kirkjumálini?

– Tað havi eg onga viðmerking til, sigur Jógvan á Lakjuni.